# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Spennandi vinnudagur

Árligi vinnudagurin er í morgin. Hann er tann tíggjundi og er ikki minst áhugaverdur, tí síðani hann varð hildin seinast, hevur kreppa rakt heimin, og í tí sambandi er eisini áhugavert at seta føroysku vinnuna í fokus umframt at frætta, hvussu gongur í øðrum londum og her ikki minst hjá grannum okkara.

Á vinnudegnum hoyra vit oftani útlendskar serfrøðingar seta fokus á aktuel evni. Og soleiðis verður eisini hesaferð. Eitt nú fara vit at frætta, hvussu gongst hjá íslendsku grannum okkara. Vinnudagurin verður eisini brúktur til at varpa ljós á ársins virki. Hetta er tað, sum mong bíða eftir við spenningi. Ikki minst tí at avdúkingin er vorðin til ein sannan gysara, har fyritøkan Kovboy á sera professionellan og hegnisligan hátt í stuttum men rámandi filmi leggur upp til eitt veruligt klimaks. Hvør man tað vera í ár! Tað er annars roynda fyritøkan Sansir, sum hevur alla fyrireikigina av Vinnudegnum um hendi. At tað hevur eydnast fyrireikarunum at dylja vinnaran sum mansmorð má eisini sigast at vera væl klárað. Og hóast dúgliga verður gitt hvørt árið, so hevur kortini eydnast stigtakarunum at koma við einum yvirraskilsi fyri og øðrum eftir.

Hvussu verður so í ár eru tað helst mong, sum spyrja. Hvør verður ársins virki í tí kreppurakta 2009. Hyggja vit so at fyritøkunum, sum higartil eru valdar út til ársins virki, so er talan um hesar: Høvdavirkið, Havsbrún, Tórshavnar Skipasmiðja, Vónin, Eik, Vaðhorn, Thor, Reyni Service og Articon. Vit síggja, at fiskivinnan er væl umboðað, tó at eingin alifyritøka enn hevur vunnið henda heiður. Er tað tí sannlíkt, at vit fara at síggja eitt alivivirki sum ársins virki, ikki minst nú, har tað við tolni, treiskni og dugnasemi hevur eydnast hesi vinnu á sera hegnisligan hátt at koma upp úr aftur aldudalinum og í dag at ganga undan? Ein av oddamonnunum í hesi vinnu gjørdist ársins leiðari í fjør. Aftanfyri hann stendur eitt blómandi virki, sum nú hevur lagt saman við øðrum væleydnaðum alivirki. Hvat vildið verið meira náttúrligt og rætt enn at latið virkjum í alivinnuni henda heiður!

Blíva vit verandi í fiskivinnuni er tað eisini hugsandi, at okkurt av teimum gomlu og vælriknu reiðaraíunum fekk henda heiður. Eitt nú "Grótmenninir" í Klaksvík, sum hava verið av dugnaligastu fiskimonnum og sum herfyri komu heim við kanska fremsta fiskifari í heiminum, sum troytir mest sum alt tilfeingi til matna og entá umborð. Eitt gott boð halda vit. Eisini eru onnur reiðarí, sum hava gingið undan. Verður vinnarin at finna í Gøtu? Ferðavinnan er enn ikki vorðin til tað mong høvdu vónað. Men í hesi vinnu finnast undangongufólk og fyritøkur, sum eisini høvdu heiðurin uppibornan. Ein slík kundi verið alt Hotel Føroyar konseptið við menningi í Vágsbotni og við Áarvegin. Annað virki innan ferða- og flutningsvinnu er Atlantic Airways. Ella kann hugsast at dómsnevndin fer heilt aðrar leiðir og velur út eina privata fyritøku, sum veitir vørur og tænastur til vanliga brúkaran, ein stór og gomul heilsøla?

**Sosialurin**

## Hvør eigur bóltin?



KRISTIN MICHELSEN
Borgarstjóri

**Ein søga um havnagjald og ikki at gera mun á**

Tað er ikki meir enn eitt lítið ár síðani, at Tvøroyrar Kommuna noyddist í rættin fyri at hála inn eitt gjald frá Strandferðsluni fyri vatn, sum Tvøroyrar Havn hevði kravt inn síðani des 2004. Hetta gjaldið er árliga ikki meir enn ein landsstýrismaður fær útgoldið í mánaðarløn. Hóast hetta brúkti umsitingin fýra ár at stríðast ímóti og føru enntá so langt niður at samanlíkna Smyril við eina ommu, sum kom norðanífrá við einari balju at fáa sær vatn. Stjórin á Landsverk og táverandi stjóri á Strandferðsluni brúktu nógva tíð upp á at vegleiða og villleiða embætisfólk hjá Tvøroyrar Havn um, hvar rokningin hoyrdi heima. Úrslitið var, at Tvøroyrar Kommuna noyddist út í tvey sakarmál um vatnið.

Í 2002 biður Tvøroyrar Kommuna Løgtingsins fíggjarnevnd um at játta pening til asfaltering av ferjuleguni á Drelnesi, soleiðis sum tað varð gjørt í Vestmanna og Leirvík. Svarið fall beinanvegin: Sjálvt um øll skuldu viðfarast eftir sama leisti, so var fíggjarkarmurin ov trongur (er tað nakar sum kennir hetta aftur??). Eingir pengar, eingin asfaltering. Seinni er so peningur játtaður til asfaltering av øðrum ferjulegum.

Og nú stendur Tvøroyrar Kommuna aftur á gáttini til eitt nýtt sakarmál. Ikki tí, Tvøroyrar Kommuna hevur síðani 2004 roynt at loysa hetta mál við samráðingum. Trupulleikin hevur bert verið tann, at ongin var at hitta hinumegin borðið. Skiftandi landsstýrismenn og embætisfólk hava verið upptikin av at blaka bóltin frá sær. Eingin vildi eiga hann.

Í fylgjandi lesarabrøvum er ætlanin at lýsa hetta málið og (trupla) samskifti við landsmyndugleikarnir. Nú Tvøroyrar Kommuna aftur verður drigin í rættin, bert tí hon krevur inn eitt sámuligt gjald til at reka og umsita Tvøroyar Havn við, fyri at útinna tann myndugleika og eftirlit, sum er altjóða viðurkendur. Vit fara ikki longur at tiga um tað sum er farið fram, soleiðis sum vit higartil hava gjørt, tí vit hildu at vit høvdu ein samráðingarfelaga.

## Politisk kvørkratak av psykiatriskum sjúklingum



SOFFI EGHOLM
Forkvinna í Sinnisbata

Alt meðan grannalond okkara raðfesta og styrkja viðgerðartilboðini í psykiatriini, fremur Landssjúkrahúsið skerjingar, har Psykiatriski Depilin má niðurleggja vælvirkandi viðgerðartilboð, sum verður til stóran bága fyri nógvar psykiatriskar sjúklingar.

Sinnisbati kann ikki góðtaka, at **svínakrím og niðurbrendar vaskimaskinur** skulu seta dagsskránna fyri viðgerðartilboð til psykiatriskar sjúklingar í sjúkrahúsverkinum.

Tað vóru skelkandi tíðindi at frætta, at Psykiatriski Depilin á Landssjúkrahúsinum av spariorsøkum verður noyddur at **steingja** tann vælvirkandi **Deild 1** restina av árinum.

Hetta tí politisk kravboð eru komin um, at tað einasta sum hevur týdning er, at játtanin verður hildin -og peningurin til Landssjúkrahúsið strekkir ikki til. Við hesum verður ein veikur samfelagsbólkur fyri vanbýti og fær ikki ta viðgerð, sum teimum tørva.

Sinnisbati hevur fegnast um ta góðu gongd av viðgerðar- tilboðunum, sum hevur verið á Psykiatriska Deplinum, men sum nú verður fyri bakkasti, tí tað ikki finnist nøkur sum helst politisk raðfesting av psykiatriska økinum. Hetta má eisini líða fyri øðrum óvæntaðum sjúkum, sum einki hava við psykiatri at gera eins og óvantaðum útreiðslum, sum ein niðurbrend vaskimaskina.

Sinnisbati kann als ikki góðtaka, at ein heil seingjardeild soleiðis verður afturlatin og ein køvandi hond harvið verður løgd á ta góðu gongd og menning, sum hevur verið á økinum. Hettar setur nógvar sjúklingar, sum komandi mánaðir kundu fingið góða hjálp á Deild 1 í eina vánaliga støðu, eins og roknast kann við, at fleiri sjúklingar, sum annars høvdu kunna verið har, mugu á aðrar deildir. Umframt at tey koma á deildir, sum ikki eru gjørdar til teirra viðgerðartørv, so má roknast við, at tað verður yvirfylt av sjúklingum á hesum deildum, soleiðis at hetta gongur útyvir allar sjúklingar, sum verða innlagdir á psykiatriska depilin.

Yvirfyltar deildir gera viðgerðar-umhvørvið vánaligari, eins og roknast kann við at fólk verða útskrivað áðrenn tíð og at tað verður torførari at verða innlagdur hjá teimum, sum kundi hava tørv.

Alt hettar verður **sett í verk sama dag**, sum **nýggja psykiatrilógin verður sett** í gildi og kastar harvið dapran skuggar yvir henda dag, sum átti verið ein gleðisdagur fyri psykiatriina. Henda lóg fyriskrivar, at politiski mynduleikin skal skipa fyri góðum sjúkrahús-standardi og miðar eisini ímóti at minka sum mest um nýtsluna av tvingsli. Ov fá seingjarpláss og yvirfyltar seingjardeildir eru ikki góður standardur og kanska tað, sum økir mest um vandan fyri at meira tvingsul verður nýttur.

Sinnisbati harmast almikið um, at góðu politisku intentiónirnar við nýggjari psykiatrilóg, verða undirgravaðar av fíggjarligari svøltan av psykiatriska økinum og vil staðiliga mæla Føroya Løgting at syrgja fyri, at tað ber til at halda áfram vid teimum viðgerðartilboðum, sum eru í gongd - og at góða menningin á økinum ikki fær ein mønusting. Psykiatrisku sjúklingarnir mugu ikki fáa frátikið ein av teimum fáu møguleikunum tey hava.

Hetta kunnu vit ikki verða tjent við, **Sinnisbati** vil tí staðiliga mæla politikarum til, tað verði seg í samgongu og andstøðu, um at vísa, at tit eru tykkara uppgávu vaksin og gera tær neyðugu raðfestingarnar av psykiatriska økinum - sum eisini er tykkara uppgáva.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.